Brúgvagerðin um Hvannasund

Brúgv um Hvannasund er eitt av teimum samferðslumálunum, ið nú troðka á at verða loyst, men er hetta rættuliga kostnaðarmikið arbeiði

Talað hevur verið um tveir møguleikar at binda saman Borðoynna og Viðoynna — annaðhvørt við brúgvagerð ella við at fylla uppí Hvannasund, men tað er valla ivi um, at endaliga loysnin verður brúgvasamband.

Brúgvagerðin

Á Borðoyarsíðuni byrjar brúgvin norðanvert við Todnes og kemur yvir á Viðoynna tætt sunnanfyri Sandoyruna.

Brúgvalongdin verður tá 198 metrar við 8 metra fríari siglingarhædd undir henni. Brúgvin verður borin á súlum og verða tá 11 rúm millum súlurnar, hvørt 18 m breitt.

Breiddin á brúnni er ætlað at verða 8,5 m. 6,5 breið koyribreyt og 1,5 m breið gongubreyt.

Rekkverk verður á báðum síðum og autoverja á aðrari.

Samlaði kostnaðurin er *5.850.000 kr.*
harav brúgvin *4.350.000 kr.*
og vegurin *1.500.000 kr.*

Vegabyrgingin

Verður sundið typt, byrjar byrgingin 100 m norðanfyri Todnes og gongur síðan á skák norðureftir yvir á Sandoyruna.

Byrgingin verður 3 m høg úr sjónum og breiddin í erva 9,5 m, harav koyribreytin 6,5 m og gongurbreytin 1,5 m.

Her verður so eisini rekkverk á báðum síðum og autoverja á aðrari.

Til ífyllu av gróti skulu brúkast 34.600 m³, sum er mett at kosta 1.384.000 kr. Samlaði kostnaðurin er mettur til 2.500.000 kr.

Bátsparturin hjá royndarskipinum í grunn

Fiskirannsóknarstovan leigaði teir báðar bátarnar Grunnabar og Núgvunes til royndarfiskiskap við troli innanfyri fiskimarkið nakrar mánaðir í summar. Annar av bátunum royndi 4 og annar 3 mánaðir.

Teir fingu nógvan fisk við trolinum — meginparturin flatfiskur. Helst var tað á leiðini 6—10 fjórðingar eystanfyri Fuglovnna, ið roynt varð.

Tó royndu bátarnir einstakar ferðir inni á vanligari fiskileið, hvat elvdi til hópin av klagum frá fiskimonnum norðanfyri.

Orsakað av hesum helt landsstýrið seg ikki til at taka figgjarábyrgdina av at lata bátarnar royn 1 mánað aftrat.

Vinningurin hjá báðum bátunum var 144.000 kr.

Á fundi hósdagin gjørdi landsstýrið av, at hesin peningur verður settur í grunn til víðari fiskikanningar.

ÚTVARPIÐ

Leygrdagin 6. desember

13.00 Feðgar á ferð. 3. partur. Framhaldssøga av Heðin Brú. Marius Johannesen lesur.
13.23 Tónleikur.
13.45 Fornnorrønar bókmentir. 2. partur.
J. H. W. Poulsen heldur fyrilestur.
14.07 Tónleikur.
14.15 Sjónarringurin.
Uttanríkispolitisk sending Evnið Japan.
14.44 Tónleikur.
15.00 Ferð og ferðsla.
N. J. Arge leggur til rættis.
18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Harmonikan.
19.00 Bókmentaheiðursløn og V4.
Beinleiðis sending frá høllini á Føroya læraraskúla.
20.00 Nocturne.
Ivar Iversen leggur til rættis.
20.30 Rannuvá. 4. partur.
Søga eftir Dagmar Joensen Næs.
Kristina Øster lesur.
21.00 Glymur dansur í høll.
21.30 Leygarkvøldspoppur
22.15 Tíðindi.
22.20 Dansur í Pálmugarðinum til kl. 23.15.

Sunnudagin 7. desember

14.00 Tónleikasending.
14.30 Kvøðuljómar.
16.50 Veðurtíðindi og tíðindi.
17.00 Evangeliskur fundur úr Ebenezer.

Mánadagin 8. desember

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Úr ymsum heraðshornum
19.00 Løtt løg.
19.30 Grammofonkonsert.
J. Haydn: Klaverkonsert í d-dur. Gábor Gabos spælir klaver, saman við Ungarska kamarorkestrinum, stjórnað av Vilmos Tátrai. — J. Haydn: Symfoni í ES-dus, nr. 43. (Mercury). Ungarska kamarorkestrið, stjórnað av Vilmos Tátrai, spælir.
20.15 Ferð og ferðsla.
N. J. Arge leggur til rættis.

Týsdagin 9. desember

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Barnasending.
19.10 Sálmar og sangir.

Mikudagin 10. desember.

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Fiskivinnutátturin.
19.10 Hornmusikkur.

Hósdagin 11. desember

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Feðgar á ferð. 5. partur. Framhaldssøga av Heðin Brú. Marius Johannesen lesur.
19.10 Tónleikur fyri hálvvaksin

Fríggjadagin 12. desember

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
1842 Fornnorrønar bókmentir. 4. partur. Jóhan Hendrik Winther Poulsen heldur fyrilestur.
19.10 Konsert.







Spinnið í Gøtu

tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.

Vit keypa óvaskaða og vaskaða ull og selja øll sløg av føroyskum tógvi.

TØTINGARVIRKIÐ

v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

EVANGELIIHÚSIÐ, Tróndarg. 36

Í kvøld útifundur á Vaglinum kl. 21, sunnudagin evangeliskir fundir í sa'inum kl. 11 og kl. 18.00.

Tekniska læran í Føroyum:

Klaksvíkin er orsøkin til steðg í byggingini, sigur J. Ziska, stjóri á Tekn. skúlanum í Havn

Rímiligt at ungfólkið verður í bygdini, sigur Ásbjørn Joensen, stjóri á Tekn. skúlanum í Klaksvík

Nevndin sum hevur kannað teknisku læruna í Føroyum var ikki samd um hvar í Føroyum ein ella fleiri tekniskir skúlar skuldu vera

Á tekniska skúlanum í Klaksvík hava teir tvær deildir, maskinmenn og snikkarar. Klaksvík hevur biðið landsstýrið um tilmæli til at seta á stovn fleiri greinir, og hevur landsstýrið sæt fá viðbúni og mælir til, at [illegible]kar skúlanum verður játtað at taka upp fleiri lærugreinir.

Tað er júst hetta sum hevur steðgað byggingini av nýggjum tekniska skúla í Havn, segði Jonan Ziska.

— [illegible]ð hevur ein nevnd, sam[illegible] av umboðum fyri meistarar, sveinar og fyri statin og kannað hvat ið skuldi verða gjørt fyri læruspurningin í Føroyum. Henda nevnd skjeyt upp at nýggjur tekniskur skúli skuldi verða bygdur í Havn, av tí at Havnin hevur $^3/_5$ av øllum lærlingum í Føroyum. Tað verður ikki hildið, at vera nóg mikið av lærlingum til at hava tveir skúlar í Føroyum, segði J Ziska og helt fram við at taka eitt dømi fyri hárfríðkingarkvinnur. Her hevur Klaksvík viljað havt deild í hesum, hóast tað á seinasta skeiði bert vóru 8 lærlingar. Fýra lærlingar til hvønn skúlan er vanvið, segði Ziska.

Um bert ein skúli var, varð møguligt at hava fastar lærarar, sum einki annað starv høvdu enn at lært frá sær á skúlanum, og ikki minni fylgt við tí seinasta sum hendir uttan um okkum. Um tveir skúlar skulu vera í Føroyum, verður neyðugt at hava tímalærara, og er tað avgjørt ikki lika gott. Tað er hugstoytt at landsstýrið tekur eina tílíka støðu áðrenn teir verunliga hava kannað málið, segði Ziska.

4. partur av greinarøð

Rímuligt at ungfólkið verður í bygdini

Viðvíkjandi lærugreinunum við tekniska skúlan í Klaksvík hava vit vent okkum til stjóran fyri